

Myndin er frá veitsluhaldi í meiarínum á 60 ára degnum hjá Lauru Joensen, sum er tiltikin dugnalig at gera føroyskan mat.

# Til stutt-leika og gaman

- Bjóða víðagitnu, serføroysku matarskránna frá Lauru Joensen.
- Leiga ein ferðafólkabát, til dømis sluppina Norðlýsið ella ein lystbát.
- Paint-ball er vælumtókt til polterabend og ungdómsveitslur – men hví ikki eisini til pensionistafelagið?
- Fá eina heildaruppliving á søguliga Seglloftinum á Tvøroyri, har Anna Kirstin Thomsen skipar fyri øllum, líka frá gastronomi, undirhaldi og dansiundirvísing.
- Spa og vakurleikarøkt er stak væl egnað til hugnaball hjá bindiklubbanum ella til polterabend.
- Leiga eina trampolin ella eina hoppiborg.
- Sigl alt selskapið út á útoyggj til skipstroyggjuball, har veitsla og gisting er í stórum tjøldum.
- Bjóða heilstokt lamb frá Árna Müller í Klaksvík. Hann kemur við grill, lambi og tilhoyri um alt landið.
- Felagið Fegin í Klaksvík leigar ein flaka út til privat-fólk. Flakin, sum kann liggja hvar sum helst, hevur tjald við vesi, og gass-grill. Pláss er fyri umleið 35 fólkum, og undirhald er við í leiguni.
- Sama felag skipar eisini fyri grillhugna í smáttuna hjá Archibald Black, bónda, í haganum hjá Nólsoyar Páll. Tað eru 20 minuttir at ganga niðan.
- Kunningarstovurnar kring landið eru altíð við upp á at skipa fyri einum góðum veitslutilboði í teirra øki.
- Eina ljósa summarnátt ber altíð til at fara oman á sandin og ganda eitt gott ball fram við báli, gittara og einum ryggsekki av dýrmætum dropum.

## Góð ráð til gestin

1. Tak besta lagið við í veitslu
2. Ver úthvíld og signalera yvirskot
3. Er talan ikki um »gávuveitslu«, er tað góður siður at taka eitthvørt smáting við til vertin
4. Ver rein og pent ílatin
5. Tak lut í veitsluni. Hon er bara so festlig, sum tú gjørt hana til
6. Tak ikki myndir, tá fólk hava fingið kenning
7. Ikki pynta teg so nógv, at tú stjelur myndina frá vertinnuni
8. Takka vertunum og sig farvæl, tá tú fert avstað

